

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale

# HVAT SKAL EG GERA, MEÐAN HM ER?

MAN HOYRIR **KONUFÓLKINI** SUFFA... OG STÚRA.. TÍ NÚ ER HON BYRJAÐ; **TÍÐIN**, TÁ EINKI KEMUR AV SKAFTI. AFTUR EITT SUMMAR, HAR GRASIÐ GRØR, OG MÁLINGIN SKALLAR AV, JA, SJÁLVT BILURIN STENDUR ÓVASKAÐUR Í TÚNINUM. MEN EINKI VERÐUR ORDNAÐ, TÍ ALT **MANNFÓLKIÐ** SITUR Í STOVUNI. VIÐ TEPPUM FYRI VINDEYGUNI OG Í ALT OV TRONGUM FÓTBÓLTSBLUSUM. OG TEIR GEYLA OG GRÁTA OG HÁLSFEVNAST Í BERARI **FÓTBÓLTSØRSKU**

Men tað eiga vit at venda til okkara fyrimun, og njóta ein mannfólkafrían mánað

## Kaffi við vinkonunum

Menninir savnast hjá hvørjum øðrum (ofta honum, sum hevur størstan skerm, harðast ljóð og bestu myrka-leggingarmøguleikar), og ístaðin fyri at grenja og knarra um tað, so kunnu vit bara gera tað sama.

Heldur enn at vit ganga hvør í okkara lagið og rudda ella gera mat ella okkurt annað óinteressant, so eiga vit nú at gera sum teir. Vit kunnu savnast, koma inn til hvørja aðra og koma hvørji aðrari við. Og skulu vit fylgja HM-skránni, so merkir tað millum ein og tríggjar smáar bindiklubbar -um dagin- í ein heilan mánað!

Tað er í summar, at vit kunnu brúka tímar uppá at flenna, gráta, minnast, droyma, tosa, slatra, ráðgeva og planleggja saman við okkara allarbestu. Og tað er ein møguleiki, sum er ov góður at lata fara.

## Biltúrar í friði og náðum

Tað er nú, tú skalt fara út á vegirnar at njóta ella venja tínar koyriførleikar, alt eftir hvørjum støði tú ert á. Nú, meðan eingin maður situr við síðuna av og hálvskeldar um, at koblingin verður fílað, ella at bakhjólini enda uppi á gongubreytini, tá tú vendur um horn.

Nú eru heldur eingir ótolnir menn í bilrøðini aftanfyri, tá tú kódnar og kódnar í eini brekku, ella tá tú steðgar á vegnum, tí tú líka mást tjekka lipglossið í speglinum, ella tí tú sært onkra, sum tú kennir og vilt práta við.

Tað er nú, tú skalt út at parallelparkera í friði og náðum. Og skuldi tú verið ov nær, soleiðis at bilurin verður skøvaður ella bukladur, so kanst tú bíða við at fortelja tað, inntil yndisliðið hjá manninum hevur vunnið ein dyst. Tá er nevniliga einki óført.

## Broyt, flyt og mála

Útnytta møguleikan, meðan maðurin situr óvitandi og hyggur at 22 tuskandi monnum.

Hevur tú altíð ynskt tær eina forstørraða mynd av mammu tíni uppiyvir seingini? Ella heldur tú, at hjallurin barasta hevði riggað so væl, viss hann var ljósareyður? Ella kundi tú hugsað tær at flutt møblarnar í stovuni umaftur-aftur-aftur? Ella er tíðin endiliga komin til, at hasir stóru, ljótu hátlararnir skulu baksast upp á ovastaloft? Droymir tú ein tílíkan dreym, men stúrir tú samstundis fyri reaktiónunum hjá makanum?

So er tað nú, tú kanst fara í gongd. Ein dystur varar knappar tveir tímar –meiri um upptaktin eisini skal við, so tað skuldi givið tær eitt gott tíðarbil at framt ynsktu broytingarnar. Teir dagarnar, fleiri dystir verða vístir, er ikki víst, at hann nakrantíð hyggur burtur frá skíggjanum, so tað gevur tær ríkilga góða tíð.

Og í hesum døgum er maðurin helst so fráverandi í ondini, at hann ikki varnast broytingarnar, fyrr enn langt eftir HM